# Kunngerðablaðið A

2025

Givið út 19. mai 2025

Nr. 97 14. mai 2025

**Kunngerð**
**um**
**loyvi til flutningsfeløg og speditørar**

Við heimild í § 10 a, § 10 b, stk. 1, § 13, stk. 3 og § 36, stk. 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 13. juni 1997, løgtingslóg nr. 35 frá 26. mars 2002, løgtingslóg nr. 118 frá 1. desember 2003 og løgtingslóg nr. 49 frá 4. mai 2021, verður ásett:

**§ 1.** TAKS kann eftir umsókn geva flutningsfyritøkum og speditørum loyvi til at tollavgreiða, gjalda og útflýggja vøru til ávísar kundar.

*Stk. 2.* Loyvið er treytað av, at tollavgreiðslan fer fram elektroniskt, at inngjalding fer fram umvegis sjálvvirkandi gjaldsloysn, sum ásett av TAKS, og at trygd frammanundan er veitt fyri tolli og avgjøldum.

*Stk. 3.* Trygdin er í minsta lagi kr. 500.000,00.

**§ 2.** Flutningsfyritøkan og speditørurin ábyrgjast fyri tolli og avgjøldum á vøruni.

**§ 3.** Flutningsfyritøka ella speditørur skal goyma vøru, sum ikki er tollavgreidd og goldin, í goymslu, sum er góðkend av TAKS.

*Stk. 2.* TAKS kann seta treytir til goymsluhølini.

**§ 4.** Flutningsfyritøka skal skráseta góðs, sum kemur við skipi, sum flutningsfyritøkan rekur, elektroniskt í skipan hjá TAKS í minsta lagi 24 tímar áðrenn skipið kemur í føroyskt tolløki, ella í seinasta lagi 1 tíma aftaná at skipið er farið úr útlendskari havn.

*Stk. 2.* Er tað eitt høvuðsgóðs, skal flutningsfyritøka ella speditørur beinanvegin, og í seinasta lagi tá ið góðsið er uppskipað á tolløkið, býta góðsið sundur, og í minsta lagi skráseta móttakara av vøruni, avsendara av vøruni, kolli, vekt og vøruheiti elektroniskt í skipan hjá TAKS. Er talan ikki um høvuðsgóðs, skal góðsið skrásetast á sama hátt sum ásett í 1. pkt. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar.

**§ 5.** Flutningsfyritøka skal skráseta góðs, sum kemur til Føroyar við flogfari, sum flutningsfyritøkan rekur, elektroniskt í skipan hjá TAKS í seinasta lagi, tá ið flogfarið fer úr útlendskari floghavn.

*Stk. 2.* Er tað eitt høvuðsgóðs, skal flutningsfyritøka ella speditørur beinanvegin býta góðsið sundur, og í minsta lagi skráseta móttakara av vøruni, avsendara av vøruni, kolli, vekt og vøruheiti elektroniskt í skipan hjá TAKS. Er talan ikki um høvuðsgóðs, skal góðsið skrásetast á sama hátt sum ásett í 1. pkt. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar.

**§ 6.** Flutningsfyritøka ella speditørur kann ikki útflýggja vøru, sum er komin við skipi, fyri enn 24 tímar eru gingnir frá tí góðsið er skrásett í skipan hjá TAKS sambært § 4, stk. 2. TAKS kann geva loyvi til, at vøra kann útflýggjast, áðrenn 24 tímar eru gingnir.

*Stk. 2.* Flutningsfyritøka ella speditørur kann ikki útflýggja vøru, sum er komin við flogfari, fyri enn 6 tímar eru gingnir frá tí góðsið er skrásett í skipan hjá TAKS sambært § 5, stk. 2. TAKS kann geva loyvi til, at vøra kann útflýggjast, áðrenn 6 tímar eru gingnir. TAKS kann geva loyvi til, at ávís vøra altíð kann útflýggjast áðrenn 6 tímar eru gingnir. TAKS kann taka loyvið eftir pkt. 2 og 3 aftur.

*Stk. 3.* Hóast ásetingina í § 6, stk. 1 og 2 kann flutningsfyritøka ella speditørur útflýggja vøru til speditørar, sum hava loyvi frá TAKS eftir hesi kunngerð.

*Stk. 4.* § 6, stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri vøru, sum kemur við posti til P/F Postverk Føroya.

**§ 7.** Flutningsfyritøka ella speditørur, sum tollavgreiðir, skal fyri hvørja vøru í skipan hjá TAKS í minsta lagi skráseta, navn og adressu hjá móttakara, navn og adressu hjá avsendara, upphædd, vørunummar og lýsing av hvat vøran inniheldur. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar.

*Stk. 2.* Vøra til vinnuligar kundar, sum ikki hava tollkreditt, skal vera endaliga tollavgreidd og goldin í seinasta lagi 14 dagar eftir, at vøran er uppskipað á tolløkið, sbrt. § 12 í løgtingslógini.

*Stk. 3.* Vøra til privatpersónar kann ikki útflýggjast til móttakaran av vøruni, fyrr enn vøran er tollavgreidd og goldin.

*Stk. 4.* Flutningsfyritøka ella speditørur skal boða TAKS frá vørusendingum frá privatpersóni til privatpersón. Vøran skal eftirkannast av TAKS, áðrenn hon kann útflýggjast.

**§ 8.** Flutningsfyritøka ella speditørur kann bert strika góðs eftir vegleiðing frá TAKS. Tann, sum strikar góðs, skal elektroniskt í skipan hjá TAKS

grundgeva fyri, hví góðs er strikað. TAKS vegleiðir um, hvussu grundgevast skal. Allar aðrar broytingar ella strikingar av góðsi skulu til TAKS til avgreiðslu.

**§ 9.** Tollskjøl, sum flutningsfyritøka ella speditørur tollavgreiðir fyri vinnuligar innflytarar, skulu útflýggjast til móttakaran av sendingini. Móttakarin av sendingini skal goyma skjølini sum roknskaparskjøl sambært løgtingslóg um bókhald.

*Stk. 2.* Tollskjøl, sum flutningsfyritøka ella speditørur tollavgreiðir fyri innflytarar, sum ikki eru vinnuligir, skulu útflýggjast til móttakaran av sendingini.

*Stk. 3.* Flutningsfyritøka og speditørur skulu hava eitt eintak av tollskjølunum eftir í skjalagoymslu síni sum eftirlitsskjal. Skjølini skulu goymast sum roknskaparskjøl sambært løgtingslóg um bókhald.

*Stk. 4.* Rættingar ella broytingar í tollrokningum skulu latast til avgreiðslu hjá TAKS saman við øllum tollskjølum.

*Stk. 5.* Um móttakarin skal tollavgreiða vøruna sjálvur, hevur flutningsfyritøkan ella speditørurin skyldu til at upplýsa honum góðsnummar á sendingini.

*Stk. 6.* Tollskjøl eru at skilja sum øll skjøl, sum skulu liggja til grund fyri tollútrokningini av vøruni, so sum farmabræv, farmagjaldsrokning, útgreinað tollingaráheitan, fakturi, váttanir, loyvir, konnossement og kreditnotur.

**§ 10.** Flutningsfyritøka ella speditørur, sum tollavgreiðir, hevur skyldu til at tryggja sær, at starvsfólk, sum tollavgreiðir, hevur vitan til tollreglurnar, toll- og vøruskránna og upprunareglurnar.

**§ 11.** TAKS kann til eina og hvørja tíð kanna grundarlagið fyri yvirflytingum og broytingum av góðsupplýsingum.

*Stk. 2.* TAKS kann til eina og hvørja tíð kanna vørur og fraktsendingar. Flutningsfyritøkan og speditørurin skulu vera TAKS til handa og skulu geva allar upplýsingar, sum TAKS metir vera neyðugar fyri at fremja eftirlitið.

**§ 12.** Brýtur flutningsfyritøka ella speditørur § 1, stk. 2, § 3, stk. 1, §§ 4-8, § 9, stk. 1-5, § 10 ella § 11, stk. 2 í hesi kunngerð, ella tær í loyvinum ásettu treytir, kann TAKS taka loyvið eftir kunngerðini aftur.

**§ 13.** Flutningsfyritøka ella speditørur, sum við vilja ella av grovum ósketni:

1) Ikki goymir vøru á góðkendari goymslu, sambært § 3, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja vøru, sum ikki er goymd á góðkendari goymslu.
2) Ikki skrásetir ella gevur skeivar upplýsingar sambært § 4, stk. 2 ella § 5, stk. 2, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja vøru, sum ikki er skrásett.
3) Útflýggjar vøru í stríð við § 6, stk. 1 ella 2 verður revsað við sekt á 5.000 kr.
4) Ikki skrásetir ella gevur skeivar upplýsingar, sambært § 7, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja sending, har vøra ikki er skrásett, ella har skeivar upplýsingar eru givnar.
5) Útflýggjar vøru í stríð við § 7, stk. 3 verður revsað við sekt á 5.000 kr.
6) Strikar góðs í stríð við vegleiðing frá TAKS, sambært § 8, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja striking, sum er framd.
7) Ikki goymir tollskjøl, sambært § 9, stk. 3, verður revsað við sekt á 3.000 kr.

*Stk. 2.* Flutningsfyritøka, sum við vilja ella av grovum ósketni ikki skrásetir góðs innan ásetta tíð, sambært § 4, stk. 1 ella § 5, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørt góðs, sum ikki er skrásett.

*Stk. 3.* Er gerðin framd við tilætlan til at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, verður fyritøkan revsað við sekt ella fongsul upp til 2 ár sambært § 34, stk. 2 í løgtingslógini.

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum at flyta vørur beinleiðis til móttakaran.

*Stk. 2.* Trygdir, sum eru givnar eftir § 1, stk. 2 í kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum at flyta vørur beinleiðis til móttakaran, eru framvegis í gildi.

*Stk. 3.* Loyvir, sum eru givin til flutningsfeløg og speditørar eftir kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum at flyta vørur beinleiðis til móttakaran, fara úr gildi, samstundis sum henda kunngerð kemur í gildi. Flutningsfeløg og speditørar varðveita loyvi við teimum treytum, sum eru ásettar í hesi kunngerð, og skulu ikki søkja av nýggjum.

Fíggjarmálaráðið, 14. mai 2025

**Ruth Vang (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Bjarni A. Bjarnason (sign.)